# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**Føðingar**
19. november fingu Anelia og Justin Philbrow, Toftir, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3800 gr.

19. november fingu Jórun og Bjarni Joensen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3280 gr.

Nikolina og Hanus Gregersen, Hósvík, hava fingið eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4000 gr.

22. november fingu Beinta Henriksen, Sørvágur og Hendrik Qvist, Uummannaq, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3400 gr.

23. november fingu Siri Reinert Hansen og Rógvi Hansen, Nes, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4150 gr.

23. november fingu Liljan og Ólavur Jacobsen, Kollafirði, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3950 gr.

24. november fingu Súsanna Arge og Einar Kerá, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3800 gr.

24. november fingu Christina Lamhauge, Tórshavn, og Fríði M. Petersen, Skopun, eina dóttur. Hon var 57 cm. long og vigaði 4000 gr.

25. november fingu Amy Hansen og Svenning Hansen, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 57 cm. long og vigaði 4250 gr.

26. november fingu Noomi Weihe og Jákup Martin Joensen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3650 gr.

26. november fingu Ragnhild Bisp Poulsen og Hjalmar Poulsen, Sandavágur, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 2450 gr.

27. november fingu Elfrida Jacobsen og Jóanes Jóhannesen, Saltnes, tvíburar - gentubørn. Tann eina var 49 cm. long og vigaði 2690 gr. og hin var 51 cm. long og vigaði 3100 gr.

**Brúdleyp**
Leygardagin 1. desember giftast Olevina Egilstoft, Sandavágur og Rolf Herup Olsen, Tórshavn. Vígslan verður í Sandavágs kirkju kl. 14 og veitsla fyri innbodnum í Pálsstovu kl. 19.

Leygardagin 1. desember klokkan 16:00 giftast í Kaldbaks kirkju Rannvá H. Skeel Johannesen, Tórshavn og Oddfríður Marni Rasmussen, Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum.

Sunnudagin 2. des. kl. 13.00 giftast í Havnar kirkju Alma Heinesen, ættað úr Sørvági og Michael Vogn Pedersen, Silkeborg. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 18.00.

**101 ár**
Leygardagin 1. desember verður Andreas Andreasen, (í Tarti) úr Oyndarfirði 101 ár. Dagurin verður hildin á Røktar- og Ellisheiminum í Runavík ímillum kl. 15 og 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ár**
Leygardagin 1. des. verður Eia Arge, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við teimum nærmastu.

**60 ár**
27. nov fylti Julia Nybo í Leirvík 60 ár. Dagurin verður hildin í Missiónshúsinum í Leirvík tann 1. des. frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Prógv**
Fríggjadagin 16. novembur fekk Barbara Michelsen, 6000 Kolding, prógv sum heilsurøktari á Social og Sundhedsskolen í Fredericia.

## Minningarorð um
# Leivur og Elnu í Skopun



12.11.2005 andaðist mamma mín Elna Clementsen og 2.10.2007 andaðist pápi mín Leivur Clementsen úr Skopun. Pápi var sjómaður alt sítt lív, fór til skips fyrstu ferð í 1927 og tað var sjálvandi við slupp. Hann sigldi undir øllum krígnum við sluppum og trolarum. Týskum sum bretskum og íslendskum, hann róði eisini út í Grønlandi við egnum báti, arbeiddi eisini í Íslandi og róði út har til tíðir. Pápi var 95 ára gamal, nú tá hann fór og mamma var 92 ára gomul tá hon fór, tey bæði høvdu eitt gott og langt lív saman og náddu at hava krúndiamantbrúdleyp saman.

Pápi var ein dugnaligur maður á sjónum og kunnaður um alt tað. Tók eingi óráð fyri, hann var eisini ein góður maður fyri bygdina, fylgdi væl við í tí politiska lívinum, mamma og pápi vóru bæði tjóðskaparsinnaði alt teirra lív. Í tí síðstu perioduni tá pápi legðist heima, róði hann út í heimbygdini við bátinum Laksurin, sum hann átti frá ungum árum, líka inntil hann ikki megnaði meir og legði árarnar inn.

Pápi var eisini ein álitismaður, hann var valdur til formann í ymsum feløgum, s. s. Arbeiðsmannafelagið, Sjúkrakassafelagið o.o.

Pápi var ein fryntligur og ráðgevandi maður í orðum og gávumildur sigst hann eisini at hava verið, og tað við lít.

Pápi og mamma áttu 2 synir, Gunnar og Tollak og áttu tey nú 6 ommu- og abbabørn og 15 langommu og langabbabørn.

Pápi var eisini ein ringan túr til sjós, tað var við trolaranum Egil Reyða, hann var nógv merktur av tí túrinum, sjálvt um hann helst ikki tosaði um tað.

Pápi kundi hava fastar meiningar um vis ting, uttan at víkja eitt fet, men tað dugdi hann at dementera uppá ein mildan ráðgevandi máta. Mamma var tann allarbesta mamman nakar sonur kundi ynskja sær, hon gav sær altíð stundir at lurta og hjálpa í øllum førum. Hon var ógvuliga hjartamild.

Eg hava bara góð minnir um míni foreldur og eg havi nógv at takka teimum fyri, nú eru tey ikki meira her, tey hava bæði livað eitt langt lív og gjørt tað tey skuldu.

Tey livdu sínar síðstu dagar á Sambýlinum á Skerðinum í heimbygdini, Skopun, har tey høvdu tað gott og vóru í góðum hondum.

Má friður verða yvir minni teirra.

**Gunnar**







# Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum, ið gjørdu mær 60 ára føðingardagin ógloymandi.

**Blíðar heilsur**
**Martin Restorff Jacobsen,**
**á Nesi, Eysturoy**

